# 14. SEPTEMBER

TÍÐINDI OG LÝSINGAR til blaðið mugu vera okkum í hendi í seinasta lagi á middegi týsdag og fríggjadag. Telefonnummar okkara er 2200

Nr. 24. | Miðvikudagur 29. mars 1967 | 21. árgangur.


# Skip og flogfør leita framvegis

**Í allan gjár og í allan fyrradagin leitaðu bæði skip og flogfør eftir gummibjargingarbátinum av Nólsoyar Pálli við teimum fýra monnunum umborð, men tað eydnaðist ikki at finna hann. Eitt flogfar helt seg seinnapartin mánadagin síggja nakað gult á sjónum í fýra sekund, men tá flogfarið kom longur niður, sá tað ikki hetta aftur. Skip hava verið á leiðini, har flogfarið helt seg síggja bátin, men tey hava ikki funnið hann.**

## Nólsoyar Páll andøvir

Mánamorgunin um sjey tíðina eydnaðist manningini á Nólsoyar Pálli at sleppa niður í lastina og teir fingu lempað saltið somikið, at skipið kom aftur á rættkjøl. Tá blaðið fór til prentingar, lá Nólsoyar Páll við sama lag og andøvdi, og sjóverjuskipið Vædderen lá hjá honum. Tað var ringt veður á leiðini, har skipið lá, og tað var ikki veður at sigla.

### Lastin skjeytst

Nólsoyar Páll sendi út neyðarkall kl. 18.00 fyrsta páskakvøld. Skipið hevði fingið sjógv og lastin skjeyt seg. Skerstokkurin lá undir og tað slapst ikki niður í lastina. Á brúnni brotnaðu ymisk tól, men teir fingu stýrt og hildu skipinum upp í ættina.

Um hálvgum sjey tíðina misti Nólsoyar Páll báðar gummibátarnar og jolluna. Í øðrum gummibátinum vóru fýra mans.

Fleiri týskir trolarar og norsk og føroysk skip fóru at leita og sigldu til Nólsoyar Páll. Týski trolarin Braunschweig fann tann tóma gummibátin kl. 03.20 mánamorgunin, og norska línuskipið Leif Aarseth fann jolluna kl. 11.21.

Tann tómi gummibáturin rak 2,5 fjórðingar um tíman, og tað passar væl til útrokningina, var tað gummibátur, flogfarið sá. Á middegi í gjár skuldu eftir útrokningunum verið best ir møguleikar at leita tætt sunnan fyri 60N og tætt vestan fyri 14W.

### Leitingin í gjár

Úr Íslandi hava eitt amerikanskt og eitt íslendskt flogfar leitað síðani tíðliga mánamorgunin, og seinna partin loysti eitt flogfar úr Bretlandi hini av.

Úr Føroyum hava skipini Boðanes, Skúgvur, Beinir, Brestir, Grímur Kamban og Kalsevni leitað, og tey uppgóvu í gjár positión triðja hvønn tíma til Tórshavnar Radio. Týsku trolararnir, sum leitaðu, halda leiðina fram.

Um middagsleitið í gjár høvdu skipini, sum leitaðu, megi 8 av norði, tað var kavælingur, men annars yvirhøvur gott sýni. Norsku skipini Leif Aarseth og Breisund eru framvegis við í leitingini.

## Seinasta um leitingina (kl. 11.10)

**Nólsoyar Páll liggur enn og andøvir, og tað er megi 10 av norði við kavælingi. Positión: 62,27 norður og 10 vestur. Norsku skipini Leif Aarseth og Breisund eru givin við leitingini. Tilsamans leita nú 7 skip, teirra millum danska skipið Esso Rønne. Ein flúgvari úr Bretlandi heldur fram við leitingini frá í morgun og møguliga eina úr Íslandi frá middegi. Í dag leita skipini nakað sýðri enn í gjár, og vindmegin í gjárskvøldið var 2 til 3.**


**Elektriskar installatiónir**
verða gjørdar:
* LJÓS
* KRAFT
* HITI
* SVAKSTREYM (samtaluannlegg, stavantennur o. a.)

Ringið til telefon 2800 og biðið um tilboð!

**Sigmund Poulsen** aut. elektroinnstallatørur
Perskonugøta 1, Tórshavn


## Útvarpið tagnað

**Sendarin hjá útvarpinum var í ólagi í allan gjár og ongin sending var, hvørki morgun, middag ella kvøld. Tað var arbeitt upp á sendaran, og roknað varð við, at hann var í lagi til sendingina í gjárkvøldið, men tað eydnaðist ikki.**

**Tað er ikki rættiliga greitt enn, hvussu illa sendarin er farin. Fólk siga seg hava sæð eld á sendistøðini 2. páskakvøld, stutt eftir at útvarpið hevði steðgað sendingini.**

**Telegrafstøðin hevur umsjón við sendaranum hjá útvarpinum. Tað er líkt til, at hann ikki altíð verður so væl røktur, sum ynskiligt kundi verið, og ruddiligast hevði verið, um vit yvirtóku teknisku leiðsluna og løgdu hana undir útvarpið.**


## Nýtt telfnr.

Vit skulu siga frá, at tann fyrsta apríl í ár, verður telefonnummar okkara broytt til 1426.

LF FØROYA FISKASØLA

## Ekspeditrisa

Ein ekspeditrisa søkist til 1. mei, helst ikki undir 20 ár. Sjálvskrivað umsókn.
Eisini ein feriuavloysari søkist til 1. juni.

Skósølan hjá
**JÓAN JAKKU.**
Tórshavn.


## Heiðursgáva

Dansk-færøsk kulturfond hevur veitt Páll Nolsøe eina heiðursgávu upp á 6 tús. krónur vegna útgávu hans av Føroya siglingarsøgu.


dimma
Grón
GAGNAST VÆL


# Kunngerð

Sum avrátt er við sjúkrahússtýrið, fer serlækni í eygnasjúkum Dag Riise at hava viðtalur á føroysku sjúkrahúsunum:

**á Landssjúkrahúsinum** (Tórshavn tlf. 1240 lok. 106) frá 19/4 til 25/4 og frá 12/5 til 15/5 1967,

**á Suðuroyar Sjúkrahúsi** (Tvøroyri tlf. 134) frá 26/4 til 3/5 1967 og

**á Klaksvíkar Sjúkrahúsi** (Klaksvík tlf. 5463) frá 5/5 til 11/5 1967.

Fólk, sum vilja hitta eygnalæknan, mugu sjálvi ringja frammanundan til skrivstovurnar á sjúkrahúsunum til at fáa at vita, nær ið tey kunna koma til viðtalu, sum verður kl. 8 — 12 og 14 — 16 hvønn gerandisdag uttan leygardag.

Av tí, at tíðin verður so knøpp, ber bara til at taka fólk, sum fingið hava ávísing frá egna lækna sínum (børn frá skúlalækna).

Viðtaludagin er **fyrst** at venda sær til skrivstovuna á sjúkrahúsinum, har 24 kr. skulu verða goldnar fyri 1. viðtalu, og 12 kr. fyri tær, sum kanska verða seinni. Fjórðingurin av hesum útreiðslum verður afturgoldin frá sjúkrakassanum.

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

**E. Bonnevie**
**hospitalinspektør**





HUGSA TYGUM UM AT FERÐAST
TOSIÐ FYRST VIÐ

faroe airways SØRVÁGUR TLF. 103

**maskin- og skipaeftirlitið**

Finnur Johansen - verkfrøðingur M. af I. - Tórshavn - Tlf. 2733